Tryggingareftirlitið

# Frágreiðing um avhendan av tryggingarmongd hjá P/F Føroya Lívstrygging

Sambært § 129 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi (tryggingarlógin) letur Tryggingareftirlitið við hesum frágreiðing um avhendan av tryggingarmongdini, sum er teknað í P/F Føroya Lívstrygging við landskassaveðhaldi á 4½ % grundarlagi til P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag.

P/F Føroya Lívstrygging hevur søkt Tryggingareftirlitið um loyvi til at avhenda nevndu tryggingarmongd. Avhendanin er liður í einskiljingini av P/F Føroya Lívstrygging, soleiðis at verandi P/F Føroya Lívstrygging verður umskipað til ein fíggjarligan haldfelagsskap. Allar tryggingar við landskassaveðhaldi verða avhendaðar til eitt dótturfelag P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag, sum P/F Føroya Lívstrygging eigur 100 %.

Avtala um avhendan av tryggingarmongdini er gjørd millum bæði tey nevndu feløgini. Avhendanin fær roknskaparligan virkna frá 1. januar 2012.

Avhendanin av tryggingarmongdini hevur ongar broytingar við sær í tryggingartreytunum, harundir tryggingarveitingum.

Avhendanin gevur ikki tryggingartakaranum rætt til at slíta tryggingaravtaluna, sbr. § 129, stk. 5 í tryggingarlógini.

Tryggingartakarar, ið hava tryggingar í P/F Føroya Lívstrygging, sum eru teknaðar við landskassaveðhaldi á 4½ % grundarlagi hava rætt til at mótmæla avhendanini.

Møgulig mótmæli skulu latast Tryggingareftirlitinum skrivliga í seinasta lagi 19. desember 2012 á tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo ella sendast til:

Tryggingareftirlitið

Skálatrøð 20

Postboks 73

FO-110 Tórshavn

Tryggingareftirlitið, 19. september 2012